# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Hevði eg havt vald til tess, hevði eg stongt Guantanamo-fangelguna - ikki í morgin, men seinnapartin*

*(Colin Powell)*

# Russar ætla sær Norðpólin

**Russland ætlar at útvega sær prógv fyri, at havbotnurin undir Norðpólinum er partur av russiska meginlandsstøðinum**

Russisku myndugleikarnir hava sent ein kjarnorkuriknan ísbrótara á leiðina kring Norðpólin. Ørindini eru at útvega vísindalig prógv fyri, at havbotnurin undir Norðpólinum er ein partur av russiska meginlandgrunninum.

Eydnast tað russum at fáa slík prógv, kann Russland krevja ognar- og nýtslurættin til møgulig tilfeingi á og undir havbotninum á Norðpólinum, skrivar Web-avisen.

Danir og grønlendingar hava leingi hildið uppá, at havbotnurin undir Norðpólinum er framhald av grønlendska landgrunninum, og eins og russar hava teir sett sær fyri at prógva tað.

Kappingin um ríkidømið undir Norðpólinum er byrjað, tí russiski ísbrótarin er á veg til pólin.



*Russar og danir stríðast nú um rættin til ríkidømið undir Norðpólinum*



*Tá George W. Bush, forseti, kom til Bulgaria í morgun, skuldi hann millum annað tosa við bulgarska forsetan, Georgi Parvanov, um tær deyðadømdu sjúkrasystrarnar í Libya*

# Vón fyri deyðadømdum í Libya

**Fimm bulgarskar sjúkrasystrar og ein palestinskur lækni, sum eru dømd til deyða í Libya, verða helst latin leys í næstum**

Tey seks vórðu tikin fyri átta árum síðani, tí libysku myndugleikarnir vildu vera við, at tey tilætlað høvdu smittað fleiri hundrað børn við eyðkvæmi. Í desember í fjør fall dómur ímóti teimum. Hóast øll noktaðu seg sek, vórðu øll seks dømd til deyða.

Kortini bendir ymiskt á, at tey sleppa úr fongslinum og úr Libya í næstum. ES og USA hava lagt stórt trýst á libysku myndugleikarnar fyri at fáa teir at lata tey seks leys. Týski uttanríkisráðharrin, Frank-Walter Steinmeier, og ES-kommiserurin Benita Ferrero-Waldner eru í Libya í hesum døgum, og í gjár høvdu tey fund við ein son Moammar Gaddafi, forseta um tey seks. Aftan á fundin segði Steinmeier, at málið verður loyst í næstum.

Libya hevur fyrr kravt at fáa 75 mió. krónur í endurgjaldi til hvørt húski, sum hevur eitt av teimum smittaðu børnunum, men ES vil ikki gjalda. Harafturímóti hevur ES boðið Libya at senda tey 426 smittaðu børnini til Evropa, so tey kunnu fáa viðgerð her.

# Ísrael njósnast í rúmdini

Ísrael sendi í morgun ein njósnarafylgisvein í ringrás um Jørðina. Sambært útvarpinum hjá ísraelska herinum hevur fylgisveinurin so góða myndaútgerð, at hann kann avmynda allar lutir niðri á Jørðini, sum eru størri enn 70 centimetrar. Njósnarafylgisveinurin, sum hevur fingið navnið "Ofek-7", skal ætlandi virka í minst fýra ár, og eygleiðarar halda, at hann skal halda eyga við Iran og tí, sum fyriferst har.

## STUTT SAGT

### Fyri deyðarevsing

62 prosent av amerikanska fólkinum halda tað vera rætt at at hava deyðarevsing, men kortini halda næstan 40 prosent, at tey høvdu sagt nei til at sita í einum nevningatingi, sum skuldi døma eitt fólk til deyða. Eygleiðarar tulka hetta sum eitt tekin um, at innast inni eru amerikanararnir ikki so fegnir um deyðarevsingina, sum hildið verður. Hildið verður, at nógvir amerikanarar eru farnir at ivast í deyðarevsing, eftir at fleiri deyðadømdir fangar hava víst seg at vera ósekir. Síðani 1973 eru 125 deyðadømdir fangar vorðnir fríkendir, eftir at DNA-kanningar og aðrar kanningar hava kolldømt tey gomlu prógvini.

### Slopnir leysir

Tríggir finskir handilsmenn, sum vórðu tiknir í Iran í síðstu viku, sluppu í gjár úr varðhaldinum. Teir tríggir menninir vóru á handilsferð í Sameindu Arabisku Emiratunum, men tá teir fóru ein stuttleikatúr við einum báti, tók iranska sjóverjan teir. Sjóverjan vildi vera við, at teir høvdu verið innan fyri mark við oynna Abu Musa, men í gjár sluppu teir aftur til Sameindu Arabisku Emiratini, sigur fyritøkan Nokia, sum teir tríggir arbeiða hjá.

### Belgia til høgru

Alt bendir á, at teir kristiligi demokraturin Yves Leterme fer at skipa stjórn í Belgia aftan á tjóðartingsvalið í gjár, sum tann liberali flokkurin hjá Guy Verhofstadt, forsætisráðharra tapti. Politiskir eygleiðarar í Bruxelles siga, at uttanríkispolitiskt fær stjórnarskiftið neyvan nakra stórvegis ávirkan, men at stjórnarskiftið fær størri ávirkan á innanríkispolitikkin. Uttan-ríkispolitiskt er tó greitt, at Yves Leterme heldur lítið um, at Turkaland skal sleppa upp í ES.